

*Amdreas Lüzen*

og Politiken, komu 14. hvønn dag við Tjaldrinum, og vóru væl lisin.

Ein dagin fortaldi hon, at nú vóru eisini nakrir ungir "kommunistar" komnir til Føroyar. Nýtt fyri mær tá – eg mundi vera 10-12 ára gamal tá - men eingin nýggjheit í Føroyum, tí millum "kommunistarnar" var Erlendur Patursson! Eg haldi ikki, hon mundi stemma uppá teir, men hon helt 14. September, blaðið hjá tjóðveldisflokkinum, vera eitt neyðugt íkast til samfelagskjakið.

Lesihugurin hjá okkum børnum mátti stimulerast, so bøkur frá henni vóru ofta millum jólapakkarnar. Tó fekk eg eini jól Pathetique symfoniina hjá Tchaikovsky á grammofonplátu, tí hon hevði frætt, at mín áhugi gekk nógv tann vegin.

Ingeborg arbeiddi leingi í bankanum, og hon ætlaði sær helst at halda fram inntil hon bleiv 80. Hon hevði fyrireikað 80 ára føðingardagin, sum skuldi haldast við familjuni í húsum, Føroya Banki átti í Funningsbotni. Men so skuldi ikki ganga. Tíðliga á árinum bleiv hon knappliga sjúk, doyr fáar dagar seinni og fer til gravar ein illveðursdag í februar 1967.

Illveðurdagur skal valdast. Veðrið var so ringt, at kistan lætti sær á, og kom undir ein av berarunum, sum hevði dottið í grøvina um ikki onkur í síðstu løtu hevði tikið í hann.

## Andreas Lützen

Andreas Christian Lützen, pápi Ingeborg og sonur Ommu Lüt, er føddur 1875, sonur Nichels og Sigrid Mariu.

Hann fer til Havnar at ganga í skúla, og fer síðani í handilin hjá pápabeiggjanum Jacob Lützen í Havn. Hann giftist 9. november 1905 í Miðvágs kirkju við Honnu Jolinu Niclasen f. 1884 dóttir Dánial í Norðurstovu í Sørvági. Í Miðvági fáa tey tvær døtrar, Marionnu og Sigrid Mariu, og byggja sær hús. Andreas arbeiðir hesi ár í handlinum hjá sváginum Rasmus Niclasen, og tá hetta handilsvirki í 1908 verður umskipað til partafelag, er Andreas bókhaldari og ein av partaeigarunum.

Í 1912 doyr pápin, Nichels, sum í nøkur ár hevði rikið handilin í Klaksvík saman við versoninum Mourits Winther. Andreas fer aftur til Klaksvíkar at yvirtaka pápans part saman við beiggjanum Svend. Húsini í Miðvági verða seld, og verða eftir umbygging embætishús hjá nýstovnaða distriktslæknaembætinum í Vágum.

Eftir nøkur ár tekur Mourits seg úr handlinum, og Andreas og Svend halda fram undir navninum Brøður Lützen.

Andreas var ein impulsivur maður, sum hevði hug at royna nýggjar leiðir innan handilsskap, og tíðin aftaná veraldarbardagan, var helst eisini ein uppgangstíð, framtíðin sá bjørt út. Handilin gongur væl. Umframt reiðaravirksemi og vanligt handilsvirksemi verður roynt at importera vøru beinleiðis úr Spania, vøra sum varð goymd í Spaniastovuni í stóru handilshúsunum. Eisini varð ein Toystova gjørd.

## Í Mondul 1984 nr. 1 lesa vit hetta:

Í tí sunnasta húsinum, har handil var í niðastu hædd og goymsla á aðru hædd, verður innrættað eitt fyri føroysk viðurskifti einastandandi rúm í nýklassiskum stíli í helvtini av tí langa goymslurúminum.

Magnus Dam Jacobsen, á Kamarinum í Havn, var tann byggilistarligi leiðarin. Rúmið, ið varð innrættað til toystovu, er prýtt við útskornum stólpum, prýðiligum listum, pilastrum við útskornum kannelurum og rosettum. Millum bjálkarnar hava Eliesar Olsen, Jens Christian Guttesen og helst eisini Svend Lützen málað 17 smáar málningar við motivum úr umhvørvinum kring Klaksvíkshandilin og aðrastaðni úr Føroyum.

Uppgangstíðin tók ein enda við Wall Street krakkinum, og ein av fyritøkunum í Føroyum, ið kom illa fyri var so Klaksvíkshandilin, sum lat aftur í 1931.

Kjølbro var sum ungur maður upplærdur úti í Klaksvík, og nú Andreas 56 ára gamal skuldi finna sær annað arbeiði, gjørdist hann kontórmaður hjá Kjølbro.

Andreas doyr í oktober 1941, og fekk eina heldur dramatiska jarðarferð, sum hevur verið nógv umrødd. Her kunnu vit lesa, hvat Janus Djurhuus skrivar til Rigmor, systir Andreas, um hendingina. Hon var stødd í Suðuroy um tað mundið. (Tikið úr bókini J. H. O. Djurhuus Ein bókmentalig ævisøga eftir Hanus Andreassen)

## Jarðaferðin

**Klaksvík**
**10. Oktober 1941**

Kæra Rigmor!

Í dag hendi tað, ið eg havi væntað leingi. Fylgið ið fylgdi bróður tínum til gravar var komið o.u. har húsini hjá Kvalvík liggja, tá kom flúgvumaskinan yvir háls. Heldur lítil maskina, líkfylgi spjaddist í panik. Kvinnur og børn grótu, hálvsvímaðu, menninir ikki stórt frægari. Eg gekk heilt aftarlaga, við síðuna á Ewald og konu hansara, vit søktu inn í eitt hús har í nánd. So hoyrdist maskingeverini, hon tveitti 5 bumbur, kajin klovnaði og Fugloyggin sakk, ein eingilskmaður fekk eina kúlu gjøgnum armin og hin lítla dóttir Sigurð, Kirstin, datt niður av einum borði og breyt sítt lítla lær. Fimm eingilskir trawlarar lógu við kaj.

Veðrið er klárt, men stormur.

Væl fyri teg, at tú ikki upplivdi hetta. Óhugnalig løta fyri øll, mest tó fyri næstrafólkini, serliga tíni systkin, konu Andrias og børnini.

Eg vænti flúgvara á Klaksvík í morgin og komandi dagar. Liva væl og halt teg longst møguligt í Suðuroy. Í Klaksvík er einki skýli, eingin luftalarm. Í Klaksvík ótu og drukku tey – har kundi einki henda. Størri tjørneyt enn forstandarskapið í Klaksvík skal leingi leitast eftir.

Well, keep smiling

J.H.

## Egil var eisini gubbi Bjarna Lützen

Í dagbókini hjá Egili Djurhuus verður ofta nevndur gudsonurin Albert hjá Søren á Krákusteini, sum ofta vitjar hann. Hetta lá eisini væl fyri, tí Albert búði í Havn bert eitt hanagleiv frá Nólsoyarstovu, har Egil búði.

Men Egil átti so ein annan gudson eisini, og hetta var Bjarni, sonur Andreas Lützen. Hann var beiggi Ingeborg og sonur ommu Lüt, sum eisini var so dúglig at vitja Egil.

Bjarni var føddur 18. Mars 1916, og hann verður doyptur 20. august í Klaksvík. Prestur var Absalon Joensen.



*Teir fimm synirnir hjá Sigrid og Nichels Lutzen: Andrias, Mass, Svend, Gunnar og Kristoffur*



*Her tosar Bjarni, tv. við systkinabarnið Leivur Lützen. Hetta er stutt eftir seinna heimsbardaga. Bjarni umhugsar at gerast juristur. Leivur er nýliga komin heim úr Danmark, har hann hevur gjørt sínar fyrstu royndir í fakinum. Teir eru staddir í Realskúlahavanum í Havn, har teir vitja pápabeiggjan Christoffer Lützen*



*Ingeborg Lützen*